# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 04. nov. 2010

Møtt vóru: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels Olaf Eyvindsson, Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

Fundurin varð settur kl. 18.10.

1. **Umsókn um stuðul til nýggjárshald í Hvalba.**
   Samtykt varð at stuðla hesum við kr. 20.000,-.

2. **Skriv frá Búnaðarstovuni viðv. matr. nr. 84h í Hvalba til ummælis.**
   Í hesum sambandi biður Búnaðarstovan um ummæli frá Hvalbiar Kommunu. Samtykt varð at viðmæla hesum.

3. **Skriv frá Búnaðarstovuni viðv. matr. nr. 57a í Hvalba til ummælis.**
   Samtykt varð at viðmæla, at hon fær úthús og nakað av lendi til keyps.

4. **Skriv frá Trivnaðarnevndini um bygging av barnagarði.**
   Ein samd Trivnaðarnevnd hevur á fundi 21. okt 2010 viðtikið at heita á Hvalbiar Kommunu um at fara undir at byggja barnagarð í Hvalba. Samtykt varð at fáa ein ráðgeva at kanna, hvat ein slík verkætlan kemur at kosta.

   **(**Áðrenn mál nr. 5 kom fyri, fór Niels Olaf av fundinum vegna ógegni.**)**

5. **Skriv viðv. matr. nr. 39a.**
   Sum framhald frá síðsta fundi 14.10.2010, har Martin í Nesi hevði uppskot frammi um møguliga at keypa matr. nr. 39a, varð samtykt at fáa sett markið í ímóti Dan Eyvindsson og Ova Berg áðrenn arbeitt verður víðari við málinum.

6. **Innlendismálaráðið – uppskot um limir í friðingarnevnd.**
   Samtykt varð at koma við uppskoti um, at Levi Niclasen framhaldandi verður umboð í Friðingarnevndini. Sum møgulig onnur umboð, vil Hvalbiar Kommuna skjóta Rúna Thomsen og Herdis Jensen upp.

7. **Tilboð viðv. lækkan av kvisti á tekjuni á Sambýlinum.**
   Eftir áheitan hevur SH-Bygg latið inn tilboð uppá at lækka kvistin á tekjuni á sambýlinum. Samtykt varð at taka av tilboðnum, so arbeiðið verður gjørt, meðan verandi arbeiði er í gongd.

**8. Byggisamtyktin – tilboð frá Kára Thomsen, arkitekti.**

Samtykt varð at taka av tilboðnum frá Kára Thomsen, arkitekti uppá at endurskoða byggisamtyktina hjá kommununi.

**9. Felags umhvørvispláss í Suðuroy.**

Samtykt varð at senda skriv til I.R.F. har mótmælt verður, at felags umhvørvispláss verður gjørt í Trøllavík.

**10. Fyrsta viðgerð av fíggjarlógini fyri 2011.**

Fíggjarætlan fyri 2011 varð gjøgnumgingin. Útreiðslurnar til rakstur eru settar til kr. 15.626.073,- og íløgurnar uml. kr. 8.600.000,-. Samtykt varð, at skattaprosentið framhaldandi skal verða 20%.

Kunnað varð um ymisk mál.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundurin lokin kl. 22.00.